## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin skrið ella stormur av landsynningi, seinnapartin minkar hann vindin niður í strúk. Regn ella vátakavi og hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, seinnapartin upp í hvassan vind. Regn ella vátakavi av og á og hitin milum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin ælingur, partvís kavi. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Upp í ein strúk av suðri og útsynningi, sunnudagin hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar og hitin millum 2 og 6 stig.

# Stór afturgongd í ferðafólkatalinum

### 19,1% færri ferðafólk ferðaðust um flogvøllin í Vágum í februarmánaði

**FLOGVØLLUR**




Í februar í ár eru 10.770 ferðafólk farin og komin um flogvøllin í Vágum. Hetta er 19,1% færri enn í februar í fjør, tá talið var 13.319.

- Í høvuðsheitum er talan um tríggjar orsøkir: Í fjør vóru 29 dagar í februar í mun til 28 dagar í ár. Hetta svarar til 2,5%. Eingin frálandavinna hevur verið í februar í ár. Herumframt hevur ferðavirksemi verið munandi minni henda mánaðin í mun til sama mánaðan í fjør, sigur Vága Floghavn í tíðindaskrivi.

Í februar í ár hava verið 266 komur og fráferðir. Hetta er 36,7% færri enn í februar í fjør, tá tað vóru 420 komur og fráferðir.

Higartil í ár eru 23.439 ferðafólk komin og farin um floghavnina. Hetta er 12,5% færri enn sama tíðarskeið í fjør, tá ferðafólkatalið var 26.777. Orsøkirnar eru her tær somu, sum fyri februar mánað.

Fyrstu tveir mánaðirnar í ár eru 568 flogfør komin og farin um floghavnina. Tað er 36,5% færri enn sama tíðarskeið í fjør, tá 895 flogfør komu og fóru.

Samlaða farmamongdin fyrstu tveir mánaðarnar í ár var 14,8% minni enn sama tíðarskeið í fjør. Tilsamans 102,6 tons í ár í mun til 120,5 tons í í fjør.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -15 |
| Nuuk | -15 |
| Qaqortoq | -12 |
| Ammassalik | -6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | -5 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | -1 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 15 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 0 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst tekur seg upp í útsynningi úr Írlandi og fer móti Skotlandi og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Skotlandi kemur móti Føroyum og dýpist. Tað gevur nógvan vind – kanska storm á okkara leiðum. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/03 kl. 06[00] – 02/03 06[00]. Hitin í gjár: 5,0°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 01/03 kl. 06[00] – 02/03 06[00].
Avfallið higartil í mars: 0 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 19. februar | Mánin longst frá jørðini |
| 25. februar | Tendring |
| 4. mars | Fyrra kvarter |
| 7. mars | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. mars | 11:06 | 23:33 | 10:06 | 22:33 | 10:21 | 22:48 | 00:40 | 13:06 | 01:40 | 14:06 | 09:21 | 21:48 | 08:21 | 20:48 | 11:21 | 23:48 | - | 12:21 | 10:51 | 23:18 | - | 12:06 |
| 4. mars | - | 12:15 | 11:15 | 23:57 | 11:30 | - | 01:33 | 14:15 | 02:33 | 15:15 | 10:30 | 23:12 | 09:30 | 21:57 | - | 12:30 | 00:48 | 13:30 | - | 12:00 | 00:33 | 13:15 |
| 5. mars | 00:57 | 13:40 | - | 12:40 | 00:12 | 12:55 | 02:57 | 15:40 | 03:57 | 16:40 | 11:55 | - | 10:55 | 23:38 | 01:12 | 13:55 | 02:12 | 14:55 | 00:42 | 13:25 | 01:57 | 14:40 |
| 6. mars | 02:23 | 14:50 | 01:23 | 13:50 | 01:38 | 14:05 | 04:23 | 16:50 | 05:23 | 17:50 | 00:38 | 13:05 | - | 12:05 | 02:38 | 15:05 | 03:38 | 16:05 | 02:08 | 14:35 | 03:23 | 15:50 |
| 7. mars | 03:18 | 15:44 | 02:18 | 14:44 | 02:33 | 14:59 | 05:18 | 17:44 | 06:18 | 18:44 | 01:33 | 13:59 | 00:33 | 12:59 | 03:33 | 15:59 | 04:33 | 16:59 | 03:03 | 15:29 | 04:18 | 16:44 |